FCK livir í vónini

Men teir vóru ikki heilt nøgdir við, at georgiska liðið eitt lítið korter undan leikloki slapp at javna til 1–1

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen



FCK spældi javnleik á útivølli í Georgia mikukvøldið. Nú ræður um hjá FCK at fáa gott úrslit í Parkini, tá returdysturin verður spældur.

Spurningurin, um tað verður FCK ella Torpedo Kutaisi úr Georgia, sum skal spæla ímóti italska Lazio um eitt pláss í bólkaspælinum í Europa Cup, er framvegis ikki svaraður.

Mikudagin í 30 hitastigum var úrslitið 1–1. Tað áttu teir á georgiska heimaliðnum at vera mest nøgdir við.

FCK hevði nógv betri tak á spælinum, og teir kundu havt skorað fleiri mál enn tað eina, sum teir fingu miðskeiðis í 1. hálvleiki.

Sibusiso Zuma var einsamallur í FCK álopinum. Í staðin fyri Heine Fernandez hevði venjarin miðvallaran Thomas Røll á vøllinum.

Danskir fjølmiðlar siga, at Zuma var í einum flokki fyri seg, og tað var suðurafrikanski gullfuglurin, sum miðskeiðis í 1. hálvleiki skoraði FCK málið. Talan var um verjukiks frammarlaga á vøllinum. Zuma rann frá verjuni og av brotsteigarmarkinum smekkaði hann flatt dygst inn við stólparótini.

Georgiska málið kom, tá tað restaðu trettan minuttir. Afturleggingin til FCK málverjan, Magnus Kihlstedt, var so mikið miseydnað, at málverjin bara megnaði at sláa bóltin á tvørtræið, og so var ein av mótstøðumonnunum fyrstur á returinum.

FCK venjarin, Kent Karlsson, heldur seg ikki til at siga, um liðið hjá honum nú er nærri triðja innleiðandi umfarinum, enn teir vóru undan ferðini til Georgia. Men Zuma sigur seg ikki vera í iva um, at teir fara at vinna sannførandi komandi mikudag.

Ófriður

FCK ferðalagið kom í gjár aftur til Keypmannahavnar í øllum góðum. Ófriðurin, sum í nити árunum var so nógvur í gomlu sovjetisku økjunum og harvið eisini í Georgia, er ikki so nógvur nú, tíbetur.

Um enn tað er av einum heilt øðrum slagi, so er tað eitt sindur av turbulensi í FCK. Tað eru fleiri spælarar, sum nú alment geva til kennar, at teir droyma um at sleppa aðra staðni at spæla og harvið at økja um – eftir donskum fótbóltsumstøðum – tunga lønarposan.

Í FCK hava teir áður sagt, at tað kemur ikki upp á tal at selja sáttmálabundnar spælarar, tí umframt Europa Cup er tað týdningarmikið at endurvinna meistaraskapin. Men nú hevur ítróttarstjórin, Niels Christian Holmstrøm, sagt, at tað ivaleyst verður soleiðis, at teir fara at selja onkrar spælarar, tá leikluturin hjá FCK í Europa Cup verður liðugur á hesum sinni. At keypa og selja spælarar er ein partur av tí at reka eitt fótbóltsfelag, siga teir í FCK.

Mest upplagda boðið upp á spælarar, sum kunnu seljast fyri stórar upphæddir, eru verjuspælarin Jacob Laursen og álopsspælarin Sibusiso Zuma. Hesin seinni hevur sagt, at hann ætlar sær ongan veg, fyrrenn kappingarárið er liðugt, og hann í HM endaspælinum í Japan og Suðurkorea hevur vist, hvør dugur er í honum.

Verjuspælarin dylur ikki, at hann ætlar sær at fara aðra staðni at spæla fótbólt. Tað ljóðar, at Hamburger SV er áhugað at keypa, men tað sigst eisini, at fleiri feløg í bestu eingilsku deildini eru sinnað at knýta spælaran, sum hevur fingið heiðurin av at hava fingið skil upp á verjuspælið hjá FCK, afturat sær.

Jákup burtur úr steypakappingini

Molde sýndi í 1. hálvleiki stak vánaligt avrik ímóti botnliðnum á útivølli í Bryne, meðan Sogndal er komið í fjórðingsfinaluna

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Tað gekk av skriðuni, tá Jákup Mikkelsen mikukvøldið fyri fyrstu ferð royndi seg á útivølli fyri nýggja felagið hjá sær. Í áttandaparts finaluni í steypakappingini var mótstøðuliðið Bryne, sum vann 3–2.

Einki var at siga til, at Molde varð roknað sum favorittur. Tá liðini í vár hittust í landskappingardysti í Molde, vann heimaliðið 5–0!

Molde venjarin Gunde Bengtsson staðfesti eftir dystin, at hansara lið hevði ongantíð í hansara venjaratíð sýnt so vánaligt avrik, sum teir høvdu gjørt í 1. hálvleiki mikukvøldið. Tað tóktist sum um teir undirmettu mótstøðuliðið, og onkur helt, at tað tóktist sum um dysturin sunnukvøldið ímóti Rosenborg sat í beinunum.

Bryne var á odda 3–0, tá hálvur tími var farin, og teir kundu havt verið frammanfyri við fleiri málum enn tað. Tvey av málunum fingu teir eftir deyðbóltar, sum vórðu stútaðir upp um Jákup Mikkelsen. Longu í 3. minutti varð Jákup fyrstu ferð fangaður á hálvari leið, og tá 21 minuttir vóru farnir, var aftur talan um stút í bleytum boga upp um føroyska málverjan. Á hálva tímanum økti nýggi spælarin hjá Bryne til 3–0. Talan var um svenska jugoslavan Dejan Pavlovic, sum kom púra einsamallur ímóti føroyska málverjanum. Hesin Pavlovic var dagsins maður hjá Bryne, tí hann hevði eisini skorað til 2–0.

Royndu at fóta sær

Eftir hvíldina vístu teir í Molde heilt øðrvísi hugburð. Teir fingu fatur á spælinum, og tað var um reppið, at teir komu afturí-aftur.

Í 53. minutti minkaðu teir um munin eftir frísparksinnlegg, og í 66. minutti stútaðu teir innlegg í kassan, og so var støðan 3–2.

Lítla løtu seinni varð Bryne liðformaðurin rikin av vølli, tí hann fyri aðru ferð fekk gult kort. Molde hevði fleiri møguleikar síðstu løtuna, men teir noyddust at dvína og vóru tískil ikki í hattinum, tá lutur varð kastaður um, hvussu liðini skulu hittast í fjórðingsfinaluni.

Eftir dystin fór Molde liðið suður til Oslo at fyrireika seg til dystin sunnudagin ímóti Moss.

Sogndal var annar partur í rættuligum steypadrama. Teir høvdu vitjan av Start. Tá 90 minuttir vóru farnir, stóð tað á jøvnum 1–1. So var neyðugt við umdysti, og í 114. minutti eydnaðist tað Alexander Ødegaard at skora sigursmálið fyri Sogndal.

Mest óvæntaða úrslitið mikukvøldið var, at botnliðið úr Tromsø á heimavølli vann 2–0 á Stabæk.

Jákup Mikkelsen og teir vóru favorittar í steypadystinum ímóti Bryne, men teir taptu 3-2 og ruku harvið úr steypakappingini

Hetta er síðsti møguleikin hjá HB

Hóast KÍ hevur verið greitt omaná í báðum landskappingardystu num higartil í ár, so vilja tær í Klaksvík ikki viðurkenna sær favoritt heitið

KVINNUFINALAN
Jóannes Hansen

Tað eru gamlir kenningar, sum ólavsøkudag um døgurðatíð fara at stríðast um steypasigurin í kvinnufótbólti. HB og KÍ vóru í finaluni í fjør. Tá vann KÍ 2–0. Hesi liðini vóru eisini í finaluni í fyrraárið. Tá vann HB 4–3 eftir longda leiktíð. Nógvir av spælarunum, sum vóru við í fjør og í fyrraárið, eru framvegis við og skulu tískil ólavsøkudag spæla triðja finaludystin upp í slag.

Harafturat kenna spælararnir væl hvønn annan frá landsliðnum. Á gullliðnum á Isle of Man vóru fimm KÍ spælarar og seks spælarar, sum sunnudagin fara at spæla við HB.

KÍ og HB hava spælt tveir landskappingardystir higartil í ár. KÍ hevur vunnið báðar. Í Havnini vunnu tær 4–0, og í Klaksvík vunnu tær 4–1. Tí er upplagt at rokna við, at KÍ er favoritturt at endurtaka steypasigurin frá í fjør.

Men ein av landsliðsspælarunum hjá KÍ, Ragna Andreasen, traðkar á bremsuna, tá vit leggja upp til, at tær mugu finna seg í at vera favorittar. Eisini tá vit minna á, at tær síðani seinasta landskappingardystin hava fingið HB liðformannin higartil í ár, Kristinu Eyðbjarnardóttir, í sín part:

– Ein finala er altíð heilt øðrvísi, enn tað er at spæla ein vanligan landskappingardyst. Í landskappingini er samantalda úrslitið fyri nógvar dystir avgerandi. Í steypafinaluni stendur og fellur alt í einum dysti. Tá kunnu nervar gera seg galdandi, tú kanst vera óheppin og so víðari. Tí er hesin dysturin púra opin, sigur Ragna Andreasen, sum eisini vísir á, at HB sunnudagin spælir við einum liði, sum er væl betri mannað, enn tær hava verið fyrr í ár:

– Eyðvør úr Dímun og Helga Ellingsgaard fara at spæla við. Tað lyftir HB liðið fleiri flokkar upp. Vit sóu á oyggjaleikunum, hvussu fantastiska stóran týdning tað hevur at hava Helgu á liðnum, vísir Ragna á.

Rannvá er ivasom

Tá sammett verður við finaluna í fjør, so hevur KÍ umleið sama fólkið, sum tær høvdu fyri einum ári síðani. Verjuspælarin Paula Mikkelsen er burturstødd, og tað er ein smeitur. Í fjør var Margit Joensen á liðnum. Hon hevur ikki spælt í ár, tí hon hevur verið á flogbóltslandsliðnum. Ólavsøkudag fer hon til Havnar við KÍ. Hesa ferð er hon ikki spælari men liðleiðari og skal tískil nýta sínar royndir at seta fyrrverandi liðfelagarnar upp.

Ein annar landsliðsspælari í flogbólti er á KÍ liðnum. Tað er Anna Müller Jacobsen. Um hon verður á vøllinum ella á beinkinum var ikki greitt í gjár. KÍ hevur tveir góðar málverjar, og tað verður upp til venjaran, Jón Harald Poulsen, at gera av, um tað skal verða Anna Müller Jacobsen ella Vivian Andreasen, sum skal verja málið ímóti HB.

Stóra ivamálið í Klaksvík hevur síðani oyggjaleikirnar verið, um Rannvá Andreasen verður før fyri at spæla í finaluni:

– Rannvá hevur ikki vant enn, men tað er heilt víst, at hon ætlar sær at spæla við í finaluni, sigur Ragna Andreasen um tvíburðarsystrina.

Trupulleikin hjá málsókna spælaranum er, at hon í síðstu løtu í finaluni á oyggjaleikunum varð liðbandsskadd í fótliðnum. Síðani afturkomuna av Man hevur hon gingið á høkjum, men í Klaksvík roknaðu tær við, at hon fór at venja í gjárkvøldið.

Síðsti møguleikin

HB hevur ikki verið so støðugt í ár. Talan hevur verið um nógvar útskiftingar síðani finaluna í fjør, og sambært HB venjaranum, Jákup Boga Joensen, er tað nógv, sum bendir á, at finalan verður síðsti møguleikin hjá HB at vinna nakað í ár:

– Spurningurin hjá okkum er, hvussu liðið fer at síggja út seinni í summar. Fleiri av spælarunum hava ætlanir um at fara til Danmarkar at lesa, umframt at vit vita, at Eyðvør úr Dímun og Helga Ellingsgaard fara avstað aftur. Skulu vit vinna nakað, so skal tað vera sunnudagin. KÍ er favoritturt, men vit fara at stríðast fyri møguleikanum. Vit hava vant nógv, síðani tær komu aftur av oyggjaleikunum, og lagið er gott, sigur Jákup Bogi Joensen.

Helga Ellingsgaard hevur ikki tikið lut í venjingini. Hon kemur til Føroya í dag.

Tá tað fór at ljóða, at Kristina Eyðbjarnardóttir skuldi flyta til KÍ, vísti onkur á, at HB liðið fyri ein stóran part er mannað við bygdagentum. Lydia Vesturtún, Eyðfríð Kristiansen og Óluva Ellingsgaard eru allar av Eiði, og Nancy Justinussen og Gudny Langgaard eru úr Leirvík. Felags fyri tær allar er kortini, at tær arbeiða í Havnini.

Ragna Andreassen og Eyðfríð Kristiansen fara at dystast á ólavsøku.

Mynd: Álvur Haraldsen

Álops essið hjá KÍ er Rannvá Andreassen, sum var toppskjútti hjá kvinnulandliðnum á oyggjaleikunum.

Mynd: Alvur Haraldsen

Fyrireikingarnar

Í Klaksvík eru Jón Harald Poulsen og spælararnir samd um, at eingin av KÍ spælarunum skal vera í Havnini ólavsøkuaftans kvøld. Í gjárkvøldið vóru KÍ kvinnurnar saman við KÍ monnunum gestir hjá býráðnum í Klaksvík. Onkrar ætla sær til Havnar at hyggja at kappróðrinum, men tað er avtala, at tær skulu koma norður aftur, tá kappróðurin er liðugur.

HB kvinnurnar vera í høvuðsstaðnum ólavsøkuaftan, men sambært venjaranum vera tær ikki nógv at síggja:

– Vit taka uppgávuna í stórum álvara. Tað er neyðugt, at spælararnir hvíla seg nógv, og tí verður tað einki við at ganga úti langt út á náttina, sigur HB venjarin, sum vónar, at HB stuðlar fara at taka á við sínum liði:

– Vit vita, at nógvir klaksvíkingar koma í Gundadal, eisini at síggja kvinnufinaluna. HB kvinnurnar tosa enn um, hvussu hugaligt tað var, tá tær í finaludystinum í fyrraárið kendu stóran stuðul frá áskoðarunum. Vónandi verður tað soleiðis ólavsøkudag, at KÍ ikki heilt einsamalt fer at mynda karmin um finaluna, ynskir Jákup Bogi Joensen.

F r y st rst rv l v kk t lf r rk rt n,
yl u l st nn n ll v nnu k r
V t tv s n
l st kk r• kk n •T •M rk r•Et k tt r
Kn v r•K tl r•H vur•H n sk r•Sv ntur
Ym sk t lt l n n n r s vn • n n r vn
l tt r• v n t/ vn n v kk t lf r
...s lv n tl st rs n
DANAK
DNV
FARPACK
www.f r ck.m